# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Týdningarmikil ráðstevna við Al Gore

Í døgunum 7. og 8. apríl í ár verður ráðstevnan TransAtlantic Climate Conference í Norðurlandahúsinum. Endamálið við ráðstevnuni er at seta fokus á veðurlagsbroytingar í Atlantshavinum, at vita, hvat, ið kann bøta um havumhvørvið, at skapa fortreytir fyri stovnseting av einum Trans Atlantic Climate Institute (TACIT), at halda verkstovur um evni, ið hava týdning fyri alt, sum hevur við endamálið við ráðstevnuna at gera. Fyriskiparar eru m.a. Bitland og Vinnuhúsið.

Ráðstevnan hevur vakt ans úti í heimi. Orsøkin er ikki bert tann, at gitni fyrrverandi varaforsetin og umhvørvisstríðsmaðurin, Al Gore, er høvuðsrøðari, men eisini tí, at innihald og evni eru viðkomandi fyri allan heimin. Sum kunnugt liggja Føroyar landafrøðiliga í einum øki, ið hevur ómetaliga stóran týdning fyri veðurlagið í heiminum sum heild og sum er sera viðkomandi fyri sjálvt havumhvørvið í Norðurhøvum eins væl og í øllum Atlantshavi. Afturat hesum kemur so, at lív og lagna okkara enn sum áður eru knýtt at havinum, og at vit eins og allar aðrar tjóðir í Norðurhøvum hava hin størsta áhuga í at varðveita høvini rein og óspilt og harvið at verja havumhvørvið nú og fyri alla framtíð. Ráðstevnan er mannað við nøkrum av mætastu nøvnum innan hav- og veðurlagsgransking og evnini eru øll sera viðkomandi, og væntandi fara einstaklingar og fyritøkur í stórum tali at møta fyri at hoyra hesar úrmælingar gera sína metingar og hvør í sínum lagi koma við tilráðingum á hesum týdingarmikla øki.

Sera áhugavert er uppskot á ráðstevnuni um at stovna ein altjóða veðurlags- og havgranskingarstovn í Føroyum. Hetta uppskot er eins upplagt, sum tað er skilagott. Staðsetingin kundi ikki hóska betur, vit hava longu frammanundan eitt lið av framúrskarandi granskarum innan økið. Stovnurin, ið væntandi fær heitið TACIT, er helst fyrst ætlaður sum eitt slag av netverkssamstarvi millum lærdar háskúlar kring Norðurhøv við heimstaði í Føroyum. Stovnurin skal eisini fevna um samstarv millum privatar og almennar nýmeninngarvinnufyritøkur, ið arbeiða við at menna havtøkni og alt, ið hevur við sjógvin at gera. Stovnurin skal hava Ph.D lesandi og Post.Doc starvsfólk og kann hetta í sjálvum sær fáa ómetaliga stóran týdning fyri føroyska gransking, føroyskt vinnulív og fyri Føroyar sum heild. TACIT kann sostatt fara at hava sera stóran týdning ikki bert fyri føroyska gransking og nýmenning men eisini fyri umdømi Føroya í heiminum.

Sosialurin fer teir komandi dagarnar at taka upp til umrøðu nøkur av teimum áhugaverdu evnum og spurningum, ið antin eru á dagsskrá fyri ráðstevnuna ella sum upplagt er at reisa í sambandi við hesa áhugaverdu ráðstevnu. Lesarar eru vælkomnir at senda hugskot og tilfar, meiningar og viðmerkingar við heitinum "TACC" til post@sosialurin.fo

**Sosialurin**

## Rørslubrek eigur at skerjast

KRISTINA TOFTEGAARD LARSEN



Í hesum døgum, tá løgtingsins fíggjarlóg er til viðgerðar, er hóskandi at leggja uppskot fram um at skerja rørslubrekið hjá fólkum, ið sita í koyristóli.

Eg havi áður nevnt, at "eitt samfelag er ikki betri enn, hvussu tann veikasti hevur tað". Tað, sum hugsjónarliga liggur aftan fyri hesa útsøgn er, at øll fólk eru virðismikil – óansæð førleikar teirra.

Við at verða føddur í henda heim fylgir eisini ein rættur at vera borgari í hesum sama heimi. Líkamikið hvørjar umstøður gera seg galdandi ella hvørja lagnu onkur fær, so hava vit ongantíð rætt at taka virði frá einum ørðum menniskja. Tó er støðan í okkara samfelagi tíverri merkt av, at vit ótilvitað taka okkum rætt at lække lívsvirðið hjá fleiri menniskjum.

"Fólk við rørslubreki!". Tey samansettu orðini, ið gera setningin, lýsa, hvussu skert okkara samfelag er. Setningurin umboðar ein heilt stóran hóp av menniskjum. Um vit vóru eitt ríkt samfelag, sum hugsaði nóg nógv um hesar borgararnar, so hevði setningurin ikki verið til yvirhøvur.

Um allir privatir og almennir stovnar, arbeiðsgevarar og privat fólk altíð hugsaðu um, at fólk í koyristóli eisini skulu ganga á og brúka vegir, gonguteigar, hurðar, inngongdir, wc, hús, skýli, bussar v. m., so vóru fólk í koyristóli ikki rørsluskerd, men kundu frítt ferðast á somu støðum, sum vit, ið ikki sita í koyristóli. Mangan spyrji eg meg sjálva, hví alt samfelagið ikki er innrættað til øll fólk, tí tað er ein trupulleiki at ferðast, tá ið koyristólurin ikki sleppur alla staðni.

Tá ið vit koma hartil, at samfelagið er fyri øll, so kunnu vit gleða okkum at spasera "arm í hjól" við hvønn annan.

Tað er sera einkult at skerja rørslubrekið burtur, bara umstøðurnar loyva tí.

## Happing og Nólsoyar-Páll

A. GUTTORMUR DJURHUUS



Størsti spilliklútur og vittuggi, sum Føroyar hava fostrað í nýggjari tíð, man vera Nólsoyar-Páll. Hóast ungur á aldri tá hann gekk burtur millum Ongland og Føroyar, setti hann sær sjálvum minnisvarða í føroysku søguni. Og standmynd fekk hann. Reist av fávitskutum og góðtrúnum fólki. Títt og tíðum hevur hann av røttum verðið skuldsettur fyri líkt og ólíkt av okkara dugnaligu søgufrøðingum.

Horikallur varð hann sagdur at vera. Og víst fjeppaðust konufólkini uppi í honum, hóast hann ikki sá so nógv út fyri verðini. Ikki sum standmyndin í Vágsbotni, høgur og mjáur, men lágur og breiðvaksin. Hansara evnir at lumpa og lirka munu tó so ríkiliga hava vigað upp ímóti tí, at vera nakað køggutur. Kvinnutokka hevði hann í hvussu so er.

Kráddari var hann av teimum heilt stóru. Hann kramaði inn undir seg tað, hann kundi koma at. Við svikabrøgdum og snildum. Gírigur var hann sjálvandi eisini.

At taka sær óuppibornan heiður smæddist hann heldur ikki fyri. Tá "Sally et Polly" fór á land í Hvalba varð hon sleipað til Vágs, bleiv umvæld og varð til "Royndina fríðu". Nólsoyar-Páll tók sær heiðurin av at hava smíðað nýtt skip. Fyrsta í nýggjari tíð, sum var ført fyri at sigla millum lond.

Og so var hann lógbrótari og smuglari av teimum heilt ringu. Sjálvandi skuldi Royndin brúkast til loynihandil. Tað við fiskiskapinum var tað bera skálkaskjól.

Men tað ringasta av øllum við Nólsoyar-Pálli var, at hann skaraði framúr í at happa. Her kom hansara brekaða mura rættuliga til sín rætt. Sambært professara á Fróðskaparsetrinum, sum hevur kannað málið, var hann ein meistari í at happa, og hevur lært so væl frá sær, at vit enn í dag eru offur fyri hansara óndsinnaðu herferð. Tað er av hansara ávum at tað føroyska samfelagið í dag er eitt satt happarasamfelag.

Latum okkum halda uppat at happa og speireka fávitskuna og heimføðisligheitina. Latum okkum bannlýsa satiru og spottan og heldur vera fitt og elskilig hvør við annan. Latum okkum klemmast og mussast. Tó ikki maður og maður ella kvinna og kvinna.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Mortensen niels@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.